# Seinasta prædikan

**Um nakrar vikur fer Hans Jacob Joensen frá sum Føroya biskupur. Herfyri var hann í heimbygdini og prædikaði - fyri seinastu ferð sum biskupur**



*Hjúnini Lisbeth og Hans Jacob Joensen, Óli Debes, klokkari, Páll Sivertsen, deknur og Sofus Johannesen, urguansari*

Eini 70 fólk høvdu leitað sær í Gjáar kirkju tann 23. september at hoyra bygdarmannin Hans Jacob Joensen prædika. Hóast guðstænastan ikki var lýst sum fráfaringarguðstænasta, var tað greitt frammanundan, at hetta var hansara seinasta prædika í heimbygdini sum Føroya biskupur. Tí tann 1. november leggur hann frá sær.

Tá hevur hann verið í presta- og biskupayrkinum í næstan 39 ár. Hann varð fyrstu ferð tilnevndur prestur í Onne Kirkjuni á Nørrebrúgv í Keypmannahavn frá 15. desember í 1968. Tvey ár seinni fekk hann starv sum prestur við Risbjerg Kirkju í Hvidovre. Í 1975 fekk hann starv sum búfastur kapellanur við Havnar kirkju og trý ár seinni sum sóknarprestur. Í 1990 varð hann tilnevndur varabiskupur og seinna sama ár Føroya fyrsti biskupur í nýggjari tíð.



*Hans Jacob Joensen skrivar protokoll eftir guðstænastuna í heimbygdini*

Hans Jacob Joensen hevur sum vera man prædikað fleiri ferðir í Gjáar kirkju. Fyrstu ferð var longu í 1963. Tá las hann guðfrøði á lærda háskúlanum í Keypmannahavn, og Brimnes, prestur, bað hann prædika í heimbygdini. Hann prædikaði eisini við Gjógv seinni undir lestrinum, og tá hann var vorðin prestur, plagdi hann at prædika í summarfrítíðini.

## Tøkk og góðynski

Tað hava eisini verið boð eftir honum til serlig høvi í heimbygdini. Eitt nú var tað hann, sum vígdi og signaði minnisvarðan yvir sjólætnar gjáarmenn fyrst í sjeytiárunum, og tað var eisini hann, sum prædikaði, tá gjáarfólk í 2004 kundu hátíðarhalda, at 75 ár vóru liðin, síðani kirkjan í bygdini varð vígd og sum tann fyrsta á føroyskum máli.

Í prædikuni við Gjógv herfyri nýtti Hans Jacob Joensen høvi til at hugleiða eitt sindur um heimbygdina og farna tíð. Hann vísti á, at tað gamla ættarliðið er mestsum alt farið. Bygdarfólkið er fækkað munandi, men bygdin er tann sama, segði hann, áðrenn hann takkaði bygdarfólkinum fyri góðan stuðul og ynskti bygdini og bygdarfólkinum alt gott í komandi árum.

Sosialurin